

# Hálvársroknskapur 2006

## Half-year accounts 2006

FØROYA SPARIKASSI

**Føroya Sparikassi P/F**
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO-110 Tórshavn

Tel +298 348000
Fax +298 348400

Skrásetingarnummar 3293
SWIFT: SPAK FO TF

e-mail: spak@sparikassin.fo
www.sparikassin.fo

V-tal 516244
Fondskota 1620061
ISIN FO0005702340
Bloomberg: SPAK DC

**Stjórn / *Management***
Marner Jacobsen
Forstjóri / *Chief Managing Director*

Bjarni Olsen
Stjóri / *Managing Director*

**Nevnd / *Board of Directors***
Frithleif Olsen
Formaður / *Chairman*

Odd Arild Bjellvåg
Næstformaður / *Deputy Chairman*

Mathea Hilduberg
Finnbogi Niclasen
Rólant Vidtfeldt
Petur D. W. Hammer
Tórmund A. Joensen
Rakul Dam
Gert Langgaard
Bjartur Nolsøe
Marian Jacobsen

## Innihaldsyvirlit / *Index*

Gongdin seinastu 5 hálvárini / *Five half-year summary* ..... síða 3

Lyklatøl / *Ratios* ..... síða 4

Føroya Sparikassi – roknskapur fyri 1. hálvár 2006 ..... síða 6

Nýttur roknskaparháttur ..... síða 8

Føroya Sparikassi half-year accounts 2006 ..... síða 9

Accounting principles ..... síða 11

Hálvársroknskapur 2006 / *Half-year accounts 2006* ..... síða 12

# GONGDIN SEINASTU 5 HÁLVÁRINI / *FIVE HALF-YEAR SUMMARY*

DKK 1.000

| **Rakstur hálvár / *Profit and loss account half-year*** | **SAMTAK / *GROUP*** 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur / *Interest income* | 207.861 | 165.109 | 133.194 | 148.673 | 148.201 |
| Rentuútreiðslur / *Interest expense* | 83.154 | 49.423 | 33.873 | 41.474 | 52.042 |
| **Rentuinntøkur netto /** *Net interest income* | **124.707** | **115.686** | **99.321** | **107.199** | **96.159** |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v. m. / *Fee and commissions income etc.* | 58.853 | 30.636 | 12.472 | 11.194 | 7.922 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og útlendskum gjaldoyra / *Market value adjustments of securities and foreign exchange income* | 28.598 | 25.115 | 84.155 | 14.028 | -4.216 |
| Aðrar vanligar inntøkur / *Other operating income* | 6.026 | 4.910 | 6.519 | 4.148 | 2.762 |
| **Úrslit av fíggjarpostum / *Profit on financial operations*** | **218.184** | **176.347** | **202.467** | **136.569** | **102.627** |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar rakstrarútreiðslur / *Staff costs, administrative expenses and other operating expenses* | 106.751 | 85.854 | 65.162 | 62.036 | 59.469 |
| Av- og niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans / *Total depreciation, write-downs and provisions* | -11.765 | 19.367 | 78.236 | 142.381 | 14.037 |
| Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum / *Income from associated and subsidiary undertakings* | 24.283 | 0 | -744 | 241 | 142 |
| **Úrslit undan skatti / *Profit before taxes*** | **147.481** | **71.126** | **58.325** | **-67.607** | **29.263** |
| Skattur / *Taxes* | 25.618 | 15.060 | -4.570 | -13.562 | 5.812 |
| **Úrslit / *Net profit*** | **121.863** | **56.066** | **62.895** | **-54.045** | **23.451** |

## Fíggjarstøða 30. juni / *Balance sheet 30 June*

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ogn / *Assets*** | | | | | |
| Kassapeningur og innlán í øðrum lánistovnum / *Cash in hand, claims on central banks and credit institutions* | 805.966 | 262.610 | 214.179 | 243.497 | 388.039 |
| Virðisbrøv / *Securities* | 1.063.544 | 888.494 | 950.596 | 753.565 | 826.827 |
| Útlán / *Loans and advances* | 7.488.379 | 5.308.023 | 3.730.432 | 3.960.926 | 3.540.565 |
| Fastar ognir og innbúgv / *Tangible assets* | 129.676 | 124.898 | 121.377 | 128.905 | 136.089 |
| Aðrar ognir / *Other assets* | 470.346 | 251.744 | 136.524 | 102.990 | 52.296 |
| **Ogn tilsamans / *Total assets*** | **9.957.911** | **6.835.769** | **5.153.108** | **5.189.883** | **4.943.816** |
| **Skuld / *Liabilities*** | | | | | |
| Skuld til lánistovnar / *Debt to credit institutions* | 3.334.946 | 1.450.593 | 373.709 | 433.285 | 116.086 |
| Innlán / *Deposits* | 5.116.085 | 4.328.427 | 3.889.970 | 3.830.063 | 3.902.688 |
| Onnur skuld / *Other liabilities* | 390.592 | 172.680 | 72.559 | 99.253 | 78.013 |
| Eginpeningur / *Equity* | 1.116.288 | 884.069 | 816.870 | 827.282 | 847.029 |
| **Skuld tilsamans / *Total liabilities*** | **9.957.911** | **6.835.769** | **5.153.108** | **5.189.883** | **4.943.816** |

**SAMTAK / *GROUP***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lyklatøl hálvár / *Ratios half-year*** | | | | | |
| **Solvensur og kapitalur / *Solvency and capital ratios*** | | | | | |
| Solvensprosent / *Solvency ratio ( % )* | 11,2 | 14,4 | 17,9 | 21,2 | 24,9 |
| Kjarnukapitalprosent / *Core capital ratio ( % )* | 9,9 | 14,4 | 18,7 | 21,6 | 24,9 |
| **Vinningur / *Earning ratios*** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt / *Interest on equity before tax ( % )* | 14,5 | 8,3 | 7,4 | -7,9 | 3,5 |
| Renting av eginogn eftir skatt / *Interest on equity after tax ( % )* | 12,0 | 6,6 | 8,0 | -6,3 | 2,8 |
| Vinningur pr. útreiðslukrónu / *Net profit to total expense ratio* | 2,55 | 1,68 | 1,41 | 0,67 | 1,40 |
| **Marknaðarváði / *Market risk ratios*** | | | | | |
| Rentuváði / *Interest rate risk ( % )* | 0,5 | 3,5 | 2,6 | 2,8 | 2,4 |
| Gjaldoyraváði / *Foreign exchange risk ( % )* | 46,8 | 4,9 | 45,7 | 13,9 | 5,9 |
| **Gjaldføri / *Liquadity ratio*** | | | | | |
| Yvirdekningur í mun til lógarkrav um gjaldføri / *Excess cover relative to liquidity requirement* | 87,3 | 81,8 | 97,2 | 91,5 | 130,7 |
| **Lánsváði / *Credit risk ratios*** | | | | | |
| Stór engagement í mun til ansvarligan kapital / *Large loans as percentage of accountable capital ( % )* | 113,9 | 47,8 | 103,1 | 85,7 | 45,1 |
| Burturleggingarprosent / *Provisions percentage ( % )* | 2,9 | 6,4 | 9,7 | 5,1 | 2,0 |
| Tap og burturleggingar í árinum í prosentum / *Write-offs and provisions during the year ( % )* | 0,3 | 0,2 | 1,7 | 3,3 | 0,3 |
| Útlánsvøkstur / *Increase of loans ( % )* | 14,3 | 5,1 | -3,9 | -0,4 | -1,3 |
| Útlán í mun til eginognina / *Total loans in proportion to equity* | 6,7 | 6,0 | 4,6 | 4,8 | 4,2 |

**FØROYA SPARIKASSI**

## Lyklatøl hálvár / *Ratios half-year*

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvensur og kapitalur / *Solvency and capital ratios*** | | | | | |
| Solvensprosent / *Solvency ratio ( % )* | 14,8 | 18,0 | 17,9 | 21,2 | 24,9 |
| Kjarnukapitalprosent / *Core capital ratio ( % )* | 13,1 | 18,0 | 18,7 | 21,6 | 24,9 |
| **Vinningur / *Earning ratios*** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt / *Interest on equity before tax ( % )* | 13,1 | 7,8 | 7,4 | -7,9 | 3,5 |
| Renting av eginogn eftir skatt / *Interest on equity after tax ( % )* | 12,0 | 6,6 | 8,0 | -6,3 | 2,8 |
| Vinningur pr. útreiðslukrónu / *Net profit to total expense ratio* | 3,41 | 1,85 | 1,41 | 0,67 | 1,40 |
| **Marknaðarváði / *Market risk ratios*** | | | | | |
| Rentuváði / *Interest rate risk ( % )* | 1,5 | 3,0 | 2,6 | 2,8 | 2,4 |
| Gjaldoyraváði / *Foreign exchange risk ( % )* | 12,9 | 4,8 | 45,7 | 13,9 | 5,9 |
| **Gjaldføri / *Liquadity ratio*** | | | | | |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán / *Loans and advances in proportion to deposits (%)* | 110,7 | 110,3 | 106,6 | 109,1 | 92,6 |
| Yvirdekningur í mun til lógarkrav um gjaldføri / *Excess cover relative to liquidity requirement* | 62,7 | 54,8 | 97,2 | 91,5 | 130,7 |
| **Lánsváði / *Credit risk ratios*** | | | | | |
| Stór engagement í mun til ansvarligan kapital / *Large loans as percentage of accountable capital ( % )* | 79,9 | 47,8 | 103,1 | 85,7 | 45,1 |
| Burturleggingarprosent / *Provisions percentage ( % )* | 3,8 | 7,6 | 9,7 | 5,1 | 2,0 |
| Tap og burturleggingar í árinum í prosentum / *Write-offs and provisions during the year ( % )* | -0,4 | 0,2 | 1,7 | 3,3 | 0,3 |
| Útlánsvøkstur / *Increase of loans ( % )* | 10,9 | 4,4 | -3,9 | -0,4 | -1,3 |
| Útlán í mun til eginognina / *Total loans in proportion to equity* | 4,4 | 4,6 | 4,6 | 4,8 | 4,2 |

## Sparikassin metavlop fyrra hálvár

Samtakið Føroya Sparikassi kann vísa á eitt framúrskarandi úrslit fyri fyrra hálvár 2006. Avlopið er 121,9 mió. kr. eftir skatt, móti 56,1 mió. kr. fyrra hálvár 2005. Eginognin við ársbyrjan er sostatt rentað við 26,6% p.a. móti 13,6% p.a. sama tíðarskeið í fjør.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 147,5 mió. kr. móti 71,1 mió. kr. fyrra hálvár 2005. Skatturin fyri 2006 er 25,6 mió. kr móti 15,1 mió. kr. fyrra hálvár 2005.

Inntøkurnar pr. útreiðslukrónu gjørdust 2,55 kr. móti 1,68 kr. fyrra hálvár í fjør.

### Stórar inntøkur uttaneftir

Sparikassin hevur seinnu árini lagt sera stóran dent á at økja vinningin og spjaða váðan við at útvega sær inntøkur uttanlands. Hetta sæst aftur í hálvársroknskapinum, ið vísir, at serliga inntøkurnar frá virkseminum uttan fyri Føroyar eru øktar munandi. Av úrslitinum uppá 121,9 mió. kr. stava umleið 60% frá virksemi uttanlands.

Úrslitið hjá dótturbankanum Eik Bank Danmark gjørdist 37,2 mió. kr. eftir skatt móti 10,9 mió. kr. sama tíðarskeið árið fyri.

Sparikassin hevur hetta hálvárið gjørt íløgu í 25% av partabrøvunum í danska felagnum Ejendomsvækst, ið hevur sum høvuðsvirksemi at ráðgeva og bjóða fyritøkum og einstaklingum at gera íløgur í fastogn. Fyritøkan arbeiðir bæði í og uttan fyri Danmark, og hon er millum fremstu fyritøkur av sínum slag í Danmark. Úrslitið hjá Ejendomsvækst fyrra hálvár í ár gjørdist 92,3 mió. kr. eftir skatt, harav tey 25% síggjast aftur í roknskapinum hjá Føroya Sparikassa.

Hinvegin hevur Sparikassin selt Sparikassagrunninum sín ognarpart í danska felagnum DSK.

Sparikassin er størsti einstaki partaeigari í størsta íslendska sparikassanum Spron, og vinningsbýtið av hesum ognarparti gav Føroya Sparikassa 13,5 mió. kr. fyrra hálvár í ár.

### Nýtt virksemi í Føroyum

Virksemið her heima er eisini víðkað fyrra hálvár í ár. Tann 20. februar varð sparikassadeild latin upp í Klaksvík, og nýggjur deildarbygningur varð tikin í nýtslu í Fuglafirði 17. mars. Húsameklaravirkið Inni, ið er dótturfelag hjá Føroya Sparikassa, hevur eisini víðkað um sítt virksemi við at lata upp deildir í Klaksvík og Runavík.

### Stórur vøkstur í inntøkunum

Samlaðu netto rentuinntøkurnar fyri samtakið fyrra hálvárið gjørdust 124,7 mió. kr. móti 115,7 mió. kr. sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein vøkstur uppá 9,0 mió. kr. svarandi til 7,8%. Vøksturin í rentuinntøkunum stavar frá Eik Bank, ið hevur økt útlánini við heilum 1.344 mió. kr. seinasta árið, meðan netto rentuinntøkurnar í Føroyum – hóast útlánini øktust við 836 mió. kr. – lækkaðu orsakað av sera hørðu rentukappingini. Ein rentubroyting er framd fyrra hálvár 2006 við gildi frá 15. mars í ár. Rentan varð broytt, tí altjóða rentustøðið hækkaði.

Inntøkurnar frá ómaksgjøldum og provisiónum øktust við 18,1 mió. kr. ella 70,1%, úr 25,8 mió. kr. fyrra hálvár 2005 upp í 43,9 mió. kr. fyrra hálvár 2006. Vøksturin stavar serliga frá provisiónsinntøkum frá ábyrgdum.

Samanlagt gjørdust rentu- og ómaksgjøld netto 183,6 mió. kr. fyrra hálvár 2006 móti 146,3 mió. kr. fyrra hálvár í fjør. Hetta er ein vøkstur uppá 37,2 mió. kr. ella 25,5%.

### Kursvinningur av virðisbrøvum og gjaldoyra

Virðisbrøv og gjaldoyra góvu ein kursvinning uppá 28,6 mió. kr. móti 25,1 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Fyri lánsbrøv var talan um eitt kurstap, meðan partabrøv, gjaldoyra og avleidd fíggjaramboð góvu kursvinning.

### Útreiðslurnar øktar

Útreiðslurnar til starvsfólk og umsiting øktust við 21,2 mió. kr. ella 24,8%, úr 85,5 mió. kr. upp í 106,7 mió. kr. Vøksturin stavar serliga frá, at fulltíðarstørv í samtakinum eru økt 13,6%, úr 214 í 243 frá 30. juni 2005 til 30. juni 2006. Ultimo juni 2006 vóru 200 fulltíðarstørv í Føroya Sparikassa, í Eik Bank 40, og í Inni vóru 3 fulltíðarstørv. Aðrar umsitingarútreiðslur eru somuleiðis øktar.

Avskrivingarnar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum eru øktar, serliga orsakað av avskriving av goodwill í sambandi við keypið av partabrøvunum í Ejendomsvækst. Samlaðu avskrivingarnar gjørdust 11,6 mió. kr. móti 7,0 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Hinvegin eru burturleggingarnar broyttar frá eini útreiðsluføring uppá 12,4 mió. kr. fyrra hálvár í fjør til eina inntøkuføring uppá 23,3 mió. kr. fyrra hálvár í ár. Her er tað serliga búskaparstøðan í Føroyum og positiva gongdin í alivinnuni, ið hevur bøtt um gjaldsevnini hjá kundunum og harvið minkað burturleggingartørvin.

## Javnin

Javnin hjá samtakinum var 10,0 mia. kr. ultimo juni 2006, móti 6,8 mia. kr. ultimo juni 2005. Hetta er ein vøkstur uppá 3,1 mia. kr. ella 45,7%. Hetta er bæði størsti javni og størsti vøkstur í javnanum, sum Sparikassin hevur havt.

Útlánini eru økt við 2,2 mia. kr., úr 5,3 mia. kr. upp í 7,5 mia. kr. Vøkstur er bæði í Sparikassanum, sum økti útlánini við 0,8 mia. kr. og í Eik Bank, sum økti útlánini við 1,3 mia. kr. Somuleiðis øktust innlánini við 0,8 mia. kr., úr 4,3 mia. kr. upp í 5,1 mia. kr., harav 0,6 mia. kr. í Føroya Sparikassa og 0,1 mia. kr. í Eik Bank.

Skuldin til lánistovnar er nú 3,3 mia. kr. móti 1,5 mia. kr. somu tíð í fjør. Hetta er ein vøkstur uppá 1,9 mia. kr., sum er útvegað frá útlendskum peningastovnum.

Føroyskir og útlendskir íleggjarar hava í juni 2006 sett 150 mió. kr. av ansvarligum kapitali í Føroya Sparikassa. Ansvarligi kapitalurin er fingin til vega umvegis eina lánsbrævarøð, sum er skrásett á Københavns Fondsbørs og seinni eisini á VMF marknaðinum á ICEX.

Í mai 2006 hækkaði Føroya Sparikassi partapeningin við 32 mió. kr. nominelt. Hækkingin varð nýtt sum lutvíst gjald fyri keypið av 25% av partabrøvunum í Ejendomsvækst. Eftir hækkingina er partapeningurin í Føroya Sparikassa 711 mió. kr. nominelt.

Eginpeningurin er nú 1,1 mia. kr., og er hetta fyrstu ferð, at eginpeningurin er oman fyri eina milliard krónur. Somu tíð í fjør var eginpeningurin 884 mió. kr.

Solvensurin í Føroya Sparikassa er nú 14,8% móti 18,0% somu tíð í fjør, meðan solvensurin fyri samtakið er 11,2% móti 14,4% somu tíð í fjør. Lógarkravið er 8%.

Gjaldførið er 1,8 mia. kr. móti 1,1 mia. kr. somu tíð í fjør. Lógarkravið er 944 mió. kr. Hetta er ein yvirdekningur uppá 87% í mun til lógarkravið.

## Útlitini

Við støði í úrslitinum higartil í ár og útlitunum seinna hálvár, væntar Føroya Sparikassi, at úrslitið hjá samtakinum fyri alt árið 2006 fer at liggja um 225 mió. kr. áðrenn skatt.

# Alment

Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir í samsvari við lóg um bankar og sparikassar v.m. og kunngerðir og leiðreglur frá Fíggjareftirlitinum fyri peningastovnar.

## Konsernroknskapur

Konsernroknskapurin umfatar Føroya Sparikassa P/F og P/F Inni og Eik Bank A/S, sum eru 100% ogn hjá Føroya Sparikassa P/F. Av tí at P/F 12. juni 2003 hevur lutfalsliga lítið virksemið í mun til Sparikassan, og væntandi fer at steðga sínum virksemi í ár, er felagið ikki tikið við í roknskapinum hjá samtakinum.

Roknskapurin hjá konsernini verður gjørdur við at leggja saman roknskaparpostar við einsháttaðum innihaldi og við at draga innanhýsis inntøkur og útreiðslur frá saman við innanhýsis millumverandi.

## Tíðargreining

Rentuinntøkur, rentuútreiðslur og leypandi provisiónir eins og allar aðrar týðandi inntøkur og útreiðslur verða tíðargreinaðar til roknskaparárið. Ómaksgjøld og stovningarprovisiónir v.m. verða bókaðar leypandi. Vinningsbýti frá partabrøvum verður bókað sum inntøka, tá peningurin er móttikin.

Rentur av útlánum, sum verða mett at vera mist, verða ikki bókaðar sum inntøka.

## Konserninternar transaktiónir

Transaktiónir við tilknýtt og assosierað feløg verða sum meginregla gjørdar samsvarandi marknaðartreytum.

## Umrokning av útlendskum gjaldoyra

Ogn og skuld í útlendskum gjaldoyra verður bókað til almennar gjaldoyrakursir 30.06.2006. Inntøkur og útreiðslur í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar sambært galdandi valutakursum á bókingardegnum.

## Útlán, ábyrgdir og áogn í øðrum lánistovnum

Útlán, ábyrgdir og áogn í øðrum lánistovnum verða støðugt gjøgnumgingin til tess at lýsa tapsvandan. Hetta viðførir, at tap og burturleggingar til tap verða bókað í rakstrarroknskapinum undir »Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum«.

Lán við fastari rentu, har rentuváðin er avdekkaður við fíggjarligum amboðum, verða ikki kursjavnað.

## Virðisbrøv

Børsnoterað virðisbrøv verða bókað til almennar kursir 30.06.2006. Ikki børsnoterað virðisbrøv verða bókað til útveganarvirði ella til marknaðarvirði, um hetta verður mett at vera lægri.

Partabrøv, sum eru at rokna sum fíggjarlig støðisogn, verða bókað til almennar kursir.

## Kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum

Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum og assosieraðum fyritøkum verða bókaðir til roknskaparliga innara virði.

## Óítøkiligar ognir

Ritbúnaður verður bókaður til útveganarvirði, frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður linjurætt yvir 5 ár. Goodwill verður bókað til útveganarvirði við keyp, frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður linjurætt yvir 10-20 ár.

## Ítøkiligar ognir

Grundøki og bygningar verða bókað til útveganarvirði, frádrigið av- og niðurskrivingar. Avskrivað verður linjurætt yvir 50 ár og við støði í einum mettum restvirði. Grundøki verða tó ikki avskrivað.

Yvirtiknar ognir verða bókaðar til mett handilsvirði.

Innbúgv og rakstrartól verða bókað til útveganarvirði, frádrigið av- og niðurskrivingar. Avskrivað verður linjurætt yvir 5-8 ár.

Smáinnbúgv fyri minni enn 20 t. kr. verður útreiðsluført beinanvegin.

## Fíggjarlig amboð

Gjaldoyraterminshandlar verða bókaðir til marknaðarvirði við árslok.

Rentuswap, sum verða nýtt til at avdekka lán við fastari rentu, verða ikki kursjavnað. Rentur av swap verða tíðargreinaðar og bókaðar undir rentuinntøkum.

## Skattur

Roknaður skattur av vinningi verður bókaður í roknskapinum og fevnir bæði um vanligan skatt og útsettan skatt. Útsettur skattur, ið kemur av tíðarfrávikum millum roknskapin og skattaroknskapin, verður útreiðsluførdur og avsettur undir »Burturleggingar til útreiðslur«. Skattaáogn, sum sannlíkindi eru fyri verður nýtt framyvir, verður tikin við undir »Onnur aktiv«.

## Splendid Half Year Result

Føroya Sparikasssi Group has achieved an excellent result for the first half of 2006. Profit after taxes is DKK 121.9 million compared with DKK 56.1 million first half 2005. Annualized return on equity is 26.6 percent compared with 13.6 percent first half 2005.

Profit before taxes is DKK 147.5 million compared with DKK 71.1 million first half 2005. Taxes first half 2006 are DKK 25.6 million compared with DKK 15.1 million first half 2005.

Net profit to total expense ratio is DKK 2.55 compared with DKK 1.68 first half 2005.

### Large Income from Activities Abroad

In the last few years Føroya Sparikassi Group has made an effort to increase profit and spread risk by generating income from abroad. This is evident in the half year accounts which show an increased income especially from activities outside of the Faroe Islands. Approximately 60 percent of the DKK 121.9 million profit stems from activities abroad.

The Copenhagen subsidiary Eik Bank Danmark made a DKK 37.2 million profit after taxes compared with DKK 10.9 million first half last year.

Føroya Sparikassi Group has acquired 25 percent of the shares in Danish company Ejendomsvækst. Ejendomsvækst's main activities are giving advice on, providing and offering corporate and private investors investments in properties in Denmark and abroad. The Company is one of the largest in Denmark in this sector. First half 2006 Ejendomsvækst has a DKK 92.3 million profit after taxes, of which 25 percent have an effect on the Føroya Sparikassi Group result.

On the other hand, Føroya Sparikassi Group has sold its shares in the Danish company DSK.

Føroya Sparikassi Group is the largest single shareholder in the largest Icelandic savings bank Spron which has given a DKK 13.5 million dividend first half 2006.

### Domestic Activities Increased

The activities on the islands have also increased first half this year. On 20 February Føroya Sparikassi opened a new branch in Klaksvík and on 17 March the Fuglafjørður branch moved into a new branch building. Furthermore, the subsidiary real estate company Inni increased its activities by opening branches in Klaksvík and Runavík.

### Increase in Income

Net interest income first half this year is DKK 124.7 million compared with DKK 115.7 million first half last year. This is a DKK 9.0 million increase corresponding to 7.8 percent. The increase is attributed to the results of Eik Bank. Eik Bank has increased loans by DKK 1,344 million last year, while domestic net interest income, despite a DKK 836 million increase in loans, decreased due to fierce competition. The interest rate has been raised once during the first half, effective 15 March 2006, due to increased international interest rates.

Income from fee and commissions increased by DKK 18.1 million corresponding to 70.1 percent, from DKK 25.8 million first half 2005 to DKK 43.9 million first half 2006. This increase mainly stems from commission of guarantees.

Fee and commissions amounted to a net income of DKK 183.6 million first half 2006 compared with DKK 146.3 million first half 2005. This is a DKK 37.2 million increase corresponding to 25.5 percent.

### Gains on Securities and Foreign Exchange

Securities and foreign exchange contributed with a profit of DKK 28.6 million compared to DKK 25.1 million first half last year. Bonds generated a loss, while shares, foreign exchange and derivatives contributed with a profit.

### Increased Operating Expenses

Operating expences increased by DKK 21.2 million corresponding to 24.8 percent, from DKK 85.5 million to DKK 106.7 million. The increase mainly stems from a 13.6 percent increase of full time employees in the Group. The number of full time employees has increased from 214 to 243. By 30 June 2006 200 were employed by Føroya Sparikassi, 40 by Eik Bank, and 3 by Inni. Other operating expenses have increased as well.

Depreciation on tangible and intangible assets have increased mainly due to depreciation on goodwill in connection with the acquisition of the Ejendomsvækst shares. Total depreciations amounted to DKK 11.6 million compared with DKK 7.0 million first half 2005.

Net depreciation and provisions for losses amount to an appropriation of DKK 23.3 million contrasting to a cost of DKK 12.4 million first half 2005. It is mainly the positive economic situation in the Faroe Islands and the positive development of the salmon farming industry that has improved the

customers solvency and thereby decreased the need for provisions for losses.

## Balance

The Balance Sheet stands at DKK 10.0 billion compared with 6.8 billion first half 2005. This is a DKK 3.1 billion increase corresponding to 45.7 percent. This is by far the highest balance ever and the biggest increase for the Føroya Sparikassi Group as well.

Loans have increased from DKK 5.3 billion to DKK 7.5 billion. The increase includes Føroya Sparikassi with a DKK 0.8 billion increase and Eik Bank with a DKK 1.3 billion increase. There has also been an increase in deposits from DKK 4.3 billion to DKK 5.1 billion. This is a DKK 0.8 billion increase from which DKK 0.6 billion stems from Føroya Sparikassi and DKK 0.1 billion stems from Eik Bank.

Debt to financial institutions are DKK 3.3 billion compared with DKK 1.5 billion first half 2005. The increase of DKK 1.9 billion has been raised in foreign banks.

In June 2006 Føroya Sparikassi raised DKK 150 million as subordinated debt in a bond issue which was listed on the Copenhagen Stock Exchange and subsequently will be listed on the VMF market on ICEX. The bonds were sold to Faroese and foreign investors.

In May 2006 Føroya Sparikassi made a DKK 32 million nominal increase of the share capital. The increase was used to finance part of the purchase of 25 percent of the shares in Ejendomsvækst. Following completion of the share capital increase the nominal share capital of Føroya Sparikassi amounts to DKK 711 million.

The equity is DKK 1.1 billion. On June 30th 2005 the equity was DKK 884 million.

The solvency ratio of Føroya Sparikassi is 14.8 percent compared with 18.0 percent first half 2005. The Group solvency ratio is 11.2 percent compared with 14.4 percent first half 2005. The minimum required by law is 8 percent.

The liquidity is DKK 1.8 billion compared with DKK 1.1 billion first half 2005. The required minimum is DKK 944 million. This exceeds the required minimum by 87 percent.

## Outlook for 2006

Based on the first half result and the outlook for second half, Føroya Sparikassi Group estimates a DKK 225 million profit for the year before taxes.

# ACCOUNTING PRINCIPLES

## General

The consolidated and annual accounts are prepared in conformity with the Danish Act on Banks and Savings Banks and regulations and directives from the Danish Financial Supervisory Authority (Finanstilsynet).

**Consolidated Accounts**

The consolidated accounts include P/F Føroya Sparikassi, P/F Inni and Eik Bank A/S, which are 100% owned by P/F Føroya Sparikassi. Because P/F 12 June 2003 has relatively little activity in comparison to the bank, and it is anticipated that the company's operations will cease in 2006, its account activity is not included in the consolidated accounts. The consolidated accounts are prepared by consolidating items of the same nature and eliminating intra-group income and expenses, and outstanding loan balances.

**Income Recognition**

Interest income, interest expenses, recurring provisions as well as all other significant income and expenses were accrued to the accounting year. Fees, charges and commissions, etc. were entered as received. Dividends on shares were entered as income upon receipt of the funds. Interest on loans, which are identified as bad or doubtful, was not entered as income.

**Internal Transactions**

Transactions with subsidiary and associated companies were in principle executed in accordance with market conditions.

**Foreign Currency Translation**

Assets and liabilities denominated in foreign currencies were translated according to the official rates of exchange prevailing at 30 June. Income and expense related to foreign exchange were translated according to the rates of exchange prevailing at the transaction date.

**Loans, Guarantees and Claims on other Financial Institutions**

Loans, guarantees and claims on other financial institutions were continually reviewed to determine loss risk. Consequently, bad debts and provisions for bad debts were entered in the profit and loss account under »Depreciation and provisions for loss on bad debts«. Loans with fixed interest where interest risk is covered by derivatives were not subject to market value adjustments.

**Investments**

Listed securities were entered at market values at 30 June. Non-listed securities were entered at purchase price or at market price, if the latter is determined to be lower. Shares that are included in the bank's long-term investment portfolio were entered at marked value.

**Equity in Subsidiary and Associated Undertakings**

Equity in subsidiary and associated undertakings was entered at equity value.

**Intangible Assets**

Software is booked at cost less a deduction for depreciation. Software is depreciated according to the straight-line method over a period of 5 years. Goodwill is booked at purchase price, less a deduction for depreciation. Goodwill is depreciated according to the straight-line method over a period of 10-20 years.

**Tangible Assets**

Land and buildings were entered based on purchase price, less deductions for depreciation and write downs. Depreciation was taken according to the straight-line method over the estimated useful life with a maximum of 50 years. Land was not, however, depreciated. Repossessed properties were entered according to their estimated market value. Furnishings and equipment were entered at cost less deductions for depreciation and write downs. Depreciation was taken according to the straight-line method over a period of 5-8 years. Furnishings and supplies valued at less than DKK 20,000 were expensed in the purchase year.

**Financial Instruments**

Currency futures contracts were entered at market value at 30 June. Interest rate swaps that were used to secure a fixed-interest loan, were not subject to market value adjustments. Interest on swaps was accrued to the accounting period and entered as interest income.

**Taxes**

Calculated tax on the profit for the year was stated in the annual accounts and included both actual tax and deferred tax. Deferred tax resulting from the timing differences between the annual accounts and the tax accounting by the Faroese tax administration was expensed and stated under »Provisions for liabilities and charges«. Tax surplus, which in all probability will be used in future, was entered as income and stated under »Other assets«.

| **FØROYA SPARIKASSI** | | | | **SAMTAK / *GROUP*** | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 2005 | | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
| | | | **Rakstrarroknskapur hálvár/ *Profit and loss account half-year*** | | |
| 159.903 | 142.162 | 3 | Rentuinntøkur v. m. / *Interest income, etc.* | 207.861 | 165.109 |
| 72.290 | 43.313 | 4 | Rentuútreiðslur v. m. / *Interest expense, etc.* | 83.154 | 49.423 |
| **87.613** | **98.849** | | **Rentuinntøkur netto / *Net interest income*** | **124.707** | **115.686** |
| | | 5 | Vinningsbýti av partabrøvum v. m. og øðrum kapitalpørtum / | | |
| 15.939 | 2.201 | | *Dividends from shares, etc., and other holdings* | 16.729 | 5.091 |
| 27.844 | 11.794 | | Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v. m. / *Fee and commission income, etc.* | 43.911 | 25.817 |
| 819 | 85 | | Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir / *Fee and commission expense* | 1.787 | 272 |
| **130.577** | **112.759** | | **Rentu- og ómaksgjøld netto / *Net interest and fee income*** | **183.560** | **146.322** |
| | | 6 | Virðisjavnan av virðisbrøvum og útlendskum gjaldoyra v. m. / | | |
| -8.521 | 17.556 | | *Market value adjustments of securities, etc. and foreign exchange income* | 28.598 | 25.115 |
| 4.405 | 3.851 | | Aðrar vanligar inntøkur / *Other operating income* | 6.026 | 4.910 |
| **126.461** | **134.166** | | **Úrslit av fíggjarpostum / *Profit on financial items*** | **218.184** | **176.347** |
| 72.291 | 63.762 | 7 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting / *Staff costs and administrative expenses* | 106.735 | 85.538 |
| | | | Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum / | | |
| 10.026 | 5.776 | | *Depreciation and write-down of intangible and tangible assets* | 11.552 | 6.964 |
| 0 | 306 | | Aðrar rakstrarútreiðslur / *Other operating expenses* | 16 | 316 |
| | | | Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto) / | | |
| -27.149 | 8.772 | | *Net depreciation and provisions for loss on bad debts* | -23.317 | 12.403 |
| | | 8 | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum / | | |
| 61.585 | 11.198 | | *Income from associated and subsidiary undertakings* | 24.283 | 0 |
| **132.878** | **66.748** | | **Úrslit av vanligum rakstri / *Profit on ordinary operations*** | **147.481** | **71.126** |
| 11.015 | 10.682 | | Skattur / *Taxes* | 25.618 | 15.060 |
| **121.863** | **56.066** | | **Úrslit eftir skatt / *Profit after taxes*** | **121.863** | **56.066** |

| FØROYA SPARIKASSI | | | | SAMTAK / *GROUP* | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 2005 | | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
| | | | **Fíggjarstøða 30. juni / *Balance sheet 30 June*** | | |
| | | | **Ogn / *Assets*** | | |
| | | | Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn hjá tjóðbankum v. m. / | | |
| 38.680 | 36.372 | | *Cash-in-hand and demand deposits with central banks, etc.* | 38.680 | 36.372 |
| 2.409.609 | 935.678 | | Áogn í lánistovnum v. m. / *Claims on credit institutions, etc.* | 767.286 | 226.238 |
| 4.919.292 | 4.083.418 | | Útlán / *Loans and advances* | 7.488.379 | 5.308.023 |
| 722.155 | 704.422 | | Lánsbrøv v. m / *Bonds, etc.* | 768.337 | 740.199 |
| 212.353 | 101.754 | | Partabrøv v. m. / *Shares, etc.* | 222.008 | 116.561 |
| | | | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum / | | |
| 62.859 | 23.076 | | *Holdings in associated undertakings* | 62.859 | 23.076 |
| 332.448 | 148.698 | | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum / *Holdings in subsidiary undertakings* | 10.340 | 8.658 |
| 195.585 | 34.567 | | Óítøkiligar ognir / *Intangible assets* | 195.891 | 36.537 |
| 127.054 | 120.809 | | Ítøkiligar ognir / *Tangible assets* | 129.676 | 124.898 |
| 437 | 1.480 | | Egin partabrøv / *Own shares* | 437 | 1.480 |
| 85.791 | 102.352 | | Onnur ogn / *Other assets* | 268.853 | 208.625 |
| 5.165 | 5.101 | | Tíðarskeiðsavmarkingar / *Prepayments* | 5.165 | 5.102 |
| **9.111.428** | **6.297.727** | | **Ogn tilsamans / *Total assets*** | **9.957.911** | **6.835.769** |
| | | | **Skuld / *Liabilities*** | | |
| | | | Skuld til lánistovnar og tjóðbankar / | | |
| 3.107.603 | 1.318.584 | | *Debt to credit institutions and central banks* | 3.334.946 | 1.450.593 |
| 4.647.588 | 4.024.551 | | Innlán / *Deposits* | 5.116.085 | 4.328.427 |
| 83.345 | 65.752 | | Onnur skuld / *Other liabilities* | 233.565 | 164.123 |
| 0 | 0 | | Tíðarskeiðsavmarkingar / *Prepayments* | 26 | 24 |
| 6.604 | 4.771 | | Avsetingar til skyldur / *Provisions for liabilities and charges* | 7.001 | 8.533 |
| 150.000 | 0 | | Eftirstillað kapitalinnskot / *Subordinated debt* | 150.000 | 0 |
| | | | **Eginpeningur / *Equity*** | | |
| 712.368 | 680.441 | | Partapeningur og ábyrgdarfæ / *Share capital and guarantee capital* | 712.368 | 680.441 |
| 117.751 | 72.951 | | Yvirkursur við partabrævaútgávu / *Share premium account* | 117.751 | 72.951 |
| 437 | 1.480 | | Grunnur fyri egin partabrøv / *Reserves for own shares* | 437 | 1.480 |
| 44.273 | 6.437 | | Aðrir grunnar / *Other reserves* | 15.164 | 6.437 |
| 119.596 | 66.694 | | Flutt frá undanfarnum árum / *Brought forward from prior years* | 148.705 | 66.694 |
| 121.863 | 56.066 | | At flyta frá ársins úrsliti / *Carried forward from profit for the year* | 121.863 | 56.066 |
| **1.116.288** | **884.069** | | **Eginpeningur tilsamans / *Total equity*** | **1.116.288** | **884.069** |
| **9.111.428** | **6.297.727** | | **Skuld tilsamans / *Total liabilities*** | **9.957.911** | **6.835.769** |
| | | | **Tøl, ið ikki eru tikin við í javna / *Off-balance-sheet items*** | | |
| 761.043 | 217.420 | 1 | Ábyrgdir v.m. tilsamans / *Total guarantees, etc.* | 758.356 | 149.002 |
| 0 | 0 | 2 | Aðrar skyldur / *Other commitments* | 2.111 | 2.227 |
| **761.043** | **217.420** | | **Tøl, ið ikki eru tikin við í javna tilsamans / *Total off-balance-sheet items*** | **760.467** | **151.229** |

| FØROYA SPARIKASSI | | | | SAMTAK / *GROUP* | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 2005 | | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
| | | | **Viðmerkingar hálvár / *Notes half-year*** | | |
| | | 1. | **Ábyrgdir / *Guarantees*** | | |
| 403.019 | 0 | | Fíggjarligar ábyrgdir / *Financial guarantees* | 577.026 | 55.612 |
| 358.024 | 217.420 | | Aðrar ábyrgdir / *Other guarantees* | 181.330 | 93.390 |
| **761.043** | **217.420** | | **Ábyrgdir íalt / *Total guarantees*** | **758.356** | **149.002** |
| | | 2 | **Aðrar skyldur / *Other commitments*** | | |
| 0 | 0 | | Aðrar skyldur / *Other commitments* | 2.111 | 2.227 |
| **0** | **0** | | **Aðrar skyldur íalt / *Total other commitments*** | **2.111** | **2.227** |
| | | 3 | **Rentuinntøkur v. m. / *Interest income, etc.*** | | |
| | | | Áogn í lánistovnum og tjóðbankum / | | |
| 21.464 | 10.094 | | *Claims on credit institutions and central banks* | 4.787 | 3.704 |
| 121.847 | 118.832 | | Útlán / *Loans and advances* | 185.462 | 148.044 |
| 16.617 | 13.090 | | Lánsbrøv / *Bonds* | 17.544 | 13.309 |
| -25 | 146 | | Avleidd fíggjaramboð / *Derivative financial instruments* | 68 | 52 |
| | | | Herav: / *Of this:* | | |
| -25 | 146 | | Gjaldoyrasáttmálar / *Currency contracts* | 12 | 144 |
| 0 | 0 | | Rentusáttmálar / *Interest contracts* | 52 | -92 |
| 0 | 0 | | Partabrævasáttmálar / *Shares contracts* | 4 | 0 |
| **159.903** | **142.162** | | **Rentuinntøkur v. m. tilsamans / *Total interest income, etc.*** | **207.861** | **165.109** |
| | | 4 | **Rentuútreiðslur / *Interest expense*** | | |
| 39.130 | 12.708 | | Lánistovnar og tjóðbankar / *Credit institutions and central banks* | 45.532 | 16.147 |
| 33.143 | 30.586 | | Innlán / *Deposits* | 37.605 | 33.257 |
| 17 | 19 | | Ábyrgdarfæ / *Guarantee capital* | 17 | 19 |
| **72.290** | **43.313** | | **Rentuútreiðslur tilsamans / *Total interest expense*** | **83.154** | **49.423** |
| 15.939 | 2.201 | 5 | **Vinningsbýti av partabrøvum / *Dividends on holdings*** | 16.729 | 5.091 |
| | | 6 | **Virðisjavningar / *Market value adjustments*** | | |
| -19.454 | 6.662 | | Lánsbrøv / *Bonds (+/-)* | -19.705 | 8.804 |
| 5.744 | 8.917 | | Partabrøv / *Shares (+/-)* | 34.885 | 8.851 |
| 5.189 | 1.977 | | Gjaldoyra / *Currency (+/-)* | 4.870 | 1.836 |
| 0 | 0 | | Avleidd fíggjaramboð / *Derivative financial instruments* | 8.548 | 5.624 |
| **-8.521** | **17.556** | | **Virðisjavningar tilsamans / *Total market value adjustments*** | **28.598** | **25.115** |

| FØROYA SPARIKASSI | | | | SAMTAK / *GROUP* | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2006 | 2005 | | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
| | | 7 | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting /** ***Staff costs and administrative expenses*** | | |
| | | | **Lønir og samsýning til nevnd, stjórn og umboðsráð /** ***Salaries and remuneration of Board of Directors, Managing Directors and Board of Representatives*** | | |
| 1.650 | 1.489 | | Stjórn / *Managing Directors* | 1.650 | 1.489 |
| 708 | 507 | | Nevnd / *Board of Directors* | 708 | 507 |
| 31 | 33 | | Umboðsráð / *Board of Representatives* | 31 | 33 |
| **2.389** | **2.029** | | **Tilsamans /** ***Total*** | **2.389** | **2.029** |
| | | | **Starvsfólkaútreiðslur /** ***Staff costs*** | | |
| 33.141 | 28.371 | | Lønir / *Wages and salaries* | 57.351 | 41.821 |
| 3.390 | 3.111 | | Eftirlønir / *Pensions* | 4.194 | 3.699 |
| 2.139 | 2.087 | | Útreiðslur til sosiala trygd / *Social security costs* | 3.250 | 3.053 |
| **38.670** | **33.569** | | **Tilsamans /** ***Total*** | **64.795** | **48.573** |
| 31.232 | 28.164 | | Aðrar umsitingarútreiðslur / *Other administrative expenses* | 39.551 | 34.936 |
| **72.291** | **63.762** | | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans /** ***Total staff costs and administrative expenses*** | **106.735** | **85.538** |
| | | 8 | **Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum /** ***Income from associated and subsidiary undertakings*** | | |
| 23.084 | 0 | | Assosieraðar fyritøkur / *Associated undertakings* | 23.084 | 0 |
| 38.501 | 11.198 | | Tilknýttar fyritøkur / *Subsidiary undertakings* | 1.199 | 0 |
| **61.585** | **11.198** | | **Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum tilsamans /** ***Total income from associated and subsidiary undertakings*** | **24.283** | **0** |